## Holst byrjaði við máli

Superligaliðið Lyngby spældi leygardagin sín fyrsta venjingardyst í ár. Dysturin var ímóti Herfølge, og Lyngby vann dystin 2-1. Lyngby-venjaran brúkti allar spælararnar í hópinum, og tí var Tem Hansen millum spælararnar. Christian Lamhauge Holst spældi fyrra hálvleik av dystinum, og hann skoraði eisini málið til 1-1. Í seinna hálvleiki skoraðu Lyngby sigursmálið.



## Brøndby leitar í Brasil

Danska superligafelagið Brøndby roynir í hesum døgum at skifta spælarar í sínum hópi. Onkrir spælarar eru farnir, og nú eru umboð fyri felagið farin til Brasil at leita eftir nýggjum álopsspælara. Sambært BT eru tað tveir ávísir spælarar, sum Brøndby ætlar at hyggja nærri eftir í Brasil, áðrenn teir møguliga verða bodnir til Danmarkar.

## Svein Rógvi uppsagdur

**Trý stig í fimtan dystum var ov lítið, og tí hevur Svein Rógvi Nielsen fingið sekkin í Fredericia**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur als ikki gingið eftir vild hjá Svein Rógva Nielsen og Fredericia, har havnarmaðurin hevur virkað sum venjari hetta kappingarárið.

Felagið hevur bert fingið trý stig í fyrstu fimtan dystunum, og tað hevur ført til, at venjarin nú er sagdur úr starvi, boðar Fredericia frá í tíðindaskrivi.

Umframt føroyska venjaran, hevur unnustan hjá Rógva, Annika Ljósstein, eisini spælt við felagnum, men sum skilst velur hon eisini at takka fyri seg, nú avgerðin um venjaran er tikin.

## Spanskt málmet

28 ára gamli Joseba Llorente, sum spælir í álopinum hjá Valladolid, setti met um vikuskiftið. Bert sjey sekund tók tað honum at skora fyrsta málið í dystinum móti Espanyol um vikuskiftið, og hetta er met í sponskum fótbólti.

Valladolid vann dystin 2-1, og tað mundi ikki gera hýrin hjá Llorente verri, at hann eisini var maðurin, ið skoraði sigursmálið.



*Mjølnirskvinnur eru sterkar á heimavølli, og tað mugu Drátturskvinnur bara asana, eftir enn ein 5-settara, ið tær hesuferð taptu*

### FAKTA

**Úrslit um vikuskiftið:**

**Meistaradeild kvinnur:**
Fleyr-ÍF 0-3 (14-25, 12-25, 18-25)
Mjølnir-Dráttur 3-2 (16-25, 25-21, 25-23, 21-25, 17-15)

**Meistaradeild menn:**
Mjølnir-Fleyr 3-1 (20-25, 25-13, 25-14, 25-15)

# Enn ein fimm-settari

**Fyri triðju ferð hetta kappingarárið noyddist Dráttur í fimmsettara. Hesa ferð í Klaksvík, har úrslitið ikki var eftir vild hjá gestunum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fyrst í november og 12. Desember. Hetta eru dagarnar, tá Dráttur spældu dyst, og eisini tá endaði við einum 5-settara, sum Dráttur í báðum førum vann. Men á triðja sinni skuldi ikki ganga. Drátturskvinnur vóru á vitjan hjá Mjølnir, og tær úr Klaksvík vildu ikki liggja og kappast við TB um næstaftasta plássið, so tær løgdu hart fyri, og vunnu so eisini móti endanum, sjálvt um tað mangan stóð á gomlum nøglum.

### Tøtt uppgerð í Klaksvík

Eftir at gestirnir, ið vóru byrjaðar væl betur, ruku avstað við fyrsta setti, var tað sum um at Mjølnir raknaði við aftur, og úrslitið útibleiv heldur ikki.

Bæði annað og triðja sett tóku Mjølnirskvinnur sær av, og hóast tað var tepurt, sá ein avgerð út til at koma í fjórða setti, men tað vildu Drátturskvinnur øðrvísi, og vunnu tær so eisini settið. Nú stóð á jøvnum, og eitt fimta og avgerandi sett skuldi tískil spælast. Fimta settið vann Mjølnir, og tískil eisini dystin 3-2.

### Lætt hjá ÍF í Havn

Í Havn høvdu sera ungu Fleyrgenturnar vitjan av rutineraðu ÍF-kvinnunum, og tað skuldi eisini vísa seg at rutinan vann á ungdóminum, tí ÍF vann við trimum settum móti ongum.

Fleyr nýtir, so at siga sama lið í Meistaradeildini, sum tær gera í kvinnuunglingum, og tað er sjálvandi torført hjá so ungum gentum, at gera nakað við rutinerað lið sum tildømis ÍF, ið hevur fleiri leikarar, ið hava spælt flogbólt í skjótt ein mansaldur.

### Mjølnir vísti styrki

Síðsta dyst teir spældu, vóru fólk bilsin um, at Fleyr kundi vinna á oddaliðnum SÍ. Og byrjaðu fleiri so smátt at hugsa um at tað var gjørligt hjá Fleyr at vinna okkurt í ár – nakað, ið var rættuliga fjart úr huganum, áðrenn stigini vórðu hálverað.

Fleyr var um vikuskiftið á vitjan í Klaksvík, har Mjølnir bíðaðu klárir og tendraðir. Og so mikið tendraðir hava teir verið í Klaksvík, tí endin gjørdist, at Mjølnir vann dystin 3-1. Gestirnir byrjaðu annars best, og vunnu eisini fyrsta settið, men so knústu Mjølnir Fleyr, og settmunurin sigur ikki heilt so lítið.